


**Nr. 9** *28. apríl 2024* **84. árg.**

# Fyrst deyðin – so dýrdin!

*„Trýrt tú hesum?“ Jóh. 11,26.*

Tá ið Jesus stóð við grøvina hjá Lázarusi, segði hann tvey ting við ta syrgjandi familjuna. Og hetta mugu vit ikki gloyma, men leggja okkum í geyma:

**1)** „Bróðir tín skal rísa upp frá teimum deyðu.“ (Jóh. 11,23).

**2)** „Tann, sum trýr á meg, skal liva, um hann so doyr. Trýrt tú hesum?“ (Jóh. 11,25–26).

Hetta er sjálvur kjarnin í lívsins spurningi: Trýrt tú hesum? Hvat er tað, sum skal føra teg ígjøgnum deyðan og inn í títt himmalska heim? Kristus, Kristus einsamallur! Tað er bara í honum, at lyftið um uppreisnina og vónin um tað æviga lívið eru. Hann vann á deyða og grøv fyri tína skuld.

Tað kann vera, at tú situr og lesur hetta, meðan tú stríðist við vónleysan grát. Kanska hevur tú mist tín hjúnafelaga, sum tú hevur livað saman við í mong ár, ella kanska hevur tú mist eitt barn í einari syndarligari vanlukku, ella kanska mátti ein, sum stendur tær nær, lúta fyri einari ræðandi sjúku. Kristus skilir sorg tína. Hann kann sum eingin annar hava samkenslu við tær.

Kanska hevur tú eina kenslu av, at tú ikki hevur langa tíð eftir at liva í. Um tú ongantíð áður hevur sett títt álit á Harran Jesus, royn tað so, nú beinanvegin. Set tað ikki út til eina lagaligari løtu. Í tí løtuni, tú setir tær fyri at trúgva á hann, verður tú frelstur, og tað merkir, at tá ið tú dregur títt seinasta suff, fert tú frá deyðanum yvir til lívið – tað himmalska lívið. Um tú kennir Kristus, er als eingin orsøk at óttast tað, sum er hinumegin

grøvina. Hann er har longu. Og hann hevur fyrireikað tær eitt stað. Tað stendur til reiðar! Jesusi fyri at takka fært tú loyvi at uppliva eina ósigandi, æviga gleði hjá honum. Og so kanst tú taka undir við Paulusi ápostli: „Deyði, hvar er sigur tín? Deyði, hvar er broddur tín?" 1. Kor. 15,55. Hugsa tær: **Hin æviga dýrdin fylgir beint í hølunum á deyðanum!**

*„... et Ord til Dagen"* – *Effie Campbell* umsetti.

# Bønartænastan

*Hetta stykkið er niðurskrivað eftir frásøgn Jonu Henriksens.*

Ein trúgvandi norðmaður gekk fyri nøkrum árum síðani runt í Oslo og seldi kristnar bøkur. Hann gekk upp og niður gjøgnum nógvar trappur frá hurð til hurð og bankaði uppá og bjóðaði sínar bøkur fram.

Einaferð kom hann til eina hurð, sum var ovast uppi undir takinum. Hann bankaði uppá, men eingin svaraði. So tók hann í hurðina. Hon var ólæst, og tí fór hann bara inn. Har inni lá ein gomul kona í einari song úti undir væðingini. Hon var ógvuliga sjúk og slapp ikki úr songini. Hann segði henni ørindi síni, og hon vildi fegin keypa nakrar bøkur frá honum, tí hon var eisini trúgvandi.

Maðurin sá eina rúgvu av avísútklippum og smáum seðlum, sum vóru heft upp á veggin uppi yvir songini við teknistiftum og knappanálum, og beint sum hann stóð og hugdi at hesum, ringdi vekjaraklokkan á náttborðinum.

„Bíða mær eina løtu, far ikki enn," segði konan og helt saman hendur og fór at biðja fyri einum møti. Hon bað so inniliga fyri talaranum, at Gud mátti geva honum hin rætta tekstin til hetta møtið og salva hann, so hann kundi boða orðið í anda og kraft og sannleika. Síðani bað konan Gud um at draga menniskju inn undir orðið, at fólk máttu streyma til, so at salurin kundi gerast fullur, og at tey øll máttu fara vælsignað heim aftur og hava fingið tað, ið Harrin hevði ætlað teimum.

Hesin maðurin bleiv so gripin av hesi brennandi bønini. Hann sat eina løtu stillur, so spurdi hann, meðan hann peikaði upp á veggin: „Eru hatta kunngerðir um møti og gudstænastur, sum tygum biðja fyri?"

„Ja," svaraði konan. „Vinfólk støkka inn á gólvið við seðlum og kunngerðum. Eg hefti alt upp á veggin og seti vekjara-

klokkuna at ringja, so eg ikki skal gloyma at biðja, tá ið møtið verður."

Konan fór nú at siga frá, hvussu hon hevði verið ein ágrýtin arbeiðari í Guds víngarði. Hon hevði verið so íðin og fingið eina rúgvu á skaftið. Men brádliga gjørdist hon álvarsliga sjúk og legðist á songina. Hon skilti einki av øllum og fór at illneitast inn á Harran. „Harri," segði hon, „hví letur tú meg liggja her, eg, sum havi arbeitt so nógv fyri teg. Tú kanst ikki vera meg fyri uttan. Her geri eg onga nyttu."

Men tíðin leið, og hon batnaði ikki. Tá stóð tað so klárt og greitt fyri henni, hvat ið tað var, Harrin vildi henni. Hann hevði sett hana til viks, so hon skuldi fáa stundir at hugsa seg um. Hann hevði givið henni eina nýggja tænastu, bønartænastuna. Hana hevði hon misrøkt, tá ið hon hevði heilsuna.

„Eg eri trúgvandi," svaraði maðurin, „men eg kom á gátt hjá tygum og segði ikki eitt einast Guds orðið."

„Ja," svaraði konan, „tá ið tygum ganga runt og selja, skulu tygum geva teimum eitt Guds orð og kanska biðja eina bøn fyri teimum, um tey ynskja tað."

Tá ið maðurin fór avstað aftur, hugsaði hann: „Nú veit eg, hví tey kristiligu møtini her í býnum eru so ríkt vælsignað. Tey verða borin uppi á bønarveingjum."

*Effie Campbell* umsetti.

# Bøn og arbeiði

*Frank Henning Holm*

John Wesley, ið grundaði metodistakirkjuna, og sum livdi í 18. øld, skal hava sagt, at „tá ið vit biðja, verða Guds hendur settar í arbeiði". Hetta er eitt væl goymt loyndarmál fyri mong nútíðar menniskju, tí fyri ein kristnan, ið biður við trúgv í sínum hjarta, verða tvey og tvey meira enn fýra, av tí at Gud vælsignar og leggur afturat og økir um.

Tá ið talað verður um trúgvandi, ið eru komin væl fyri, verður ofta sagt, at hann ella hon eru so dugnalig. Men Gud er í botn og grund ikki bundin av okkara dugnaskapi, men harafturímóti av okkara trúfesti. Og fyri at verða varðveittur í einum trúføstum sambandi við Jesus Kristus mugu vit biðja, tí tað er bara í bøn og vígslu, at vit sanna Guds hjartaslátt í lívi okkara.

Arbeiði uttan bøn kann gerast tungt. Ofta sanna vit, at vit tærast í okkara arbeiðslívi av trýsti, strongd og vánaligum samstarvi við onnur. Bønin snarar hesum á. Vit fáa kraft og sanna, at alt gongur lættari, og at gleðin og yvirskotið í hjarta okkara aftur verður kveikt. Gud veit betur enn nakar annar, hvussu vit hava tað, og hvørjum avbjóðingum vit standa í. Um vit eta eintáttaðan kost, kunnu vit fáa trotsjúku. Um vit biðja lítið ella einki og gevast at taka Guds orð til okkara, fáa vit trotsjúku í okkara andaliga lívi.

*„Ennå er det håp!“ – Effie Campbell* umsetti.

# Samleiki – identitetur

Í verðini máta tey samleikan eftir t.d.: Hvussu vøkur ert tú? Hevur tú nakrar væleydnaðar sendingar í sjónvarpinum? Hvussu nógvar fylgjarar hevur tú á facebook? Hevur tú framgongd í lívinum og kanst vísa á góð úrslit?

Allar verðsins samleikar vara stutt – og teir geva eina falska trygd.

Okkara samleiki í Kristusi kann lýsast upp á fleiri mátar. Her er ein teirra:

**„Teimum, sum taka ímóti Jesusi, teimum, sum trúgva á navn hansara, teimum gevur hann rætt til at kalla seg Guds børn.**“ Jóh. 1,12 N.S. Eg kann ikki koma í tankar um nakað, sum er ein størri og tryggari samleiki enn at vera eitt Guds barn.

Her er eitt annað skriftstað: 2. Kor. 5,17: **„Tí, um onkur er í Kristi, er hann nýggjur skapningur; hitt gamla er farið, sí, tað er vorðið nýtt!“**

Eg kann ikki koma í tankar um nakran sterkari samleika enn at vera ein nýggjur skapningur í Kristusi.

Okkara samleiki kann ikki broytast ella minka í virði og versna. Tí hann er í Kristusi – og hann er tað hægsta, sum fæst. Hann er ein gáva frá Gudi.

*Effie Campbell umsetti.*

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 28. mai | **Tekstur:** | **(dýri biðidagur),** 1 Sám. 1,9–20; 2,1–2 | **Bíbliuorð** | 1 Sám. 2,3c |
| 5. mai | **Tekstur:** | 1 Sám. 3,1–18 | **Bíbliuorð:** | 1 Sám. 3,10b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 10** *12. mai 2024* **84. árg.**

# Tú ert ikki heima enn

*„… eg skal búgva í húsi Harrans allar ævir.“ Sálm. 23,6. V.D.*

Hvar er ætlanin, at vit skulu búgva í ævinleikanum? Í húsi Harrans. Tað merkir, at tann bústaðurin, vit hava í løtuni, er bara ein fyribils adressa. „Tí at borgaraskapur okkara er á himnum.“ Fil. 3,20. Tí er tað, at vit hava slíkan heimlongsul, eftir at hjúnafelagi okkara er deyður, eftir boðini vit hava fingið um knykilin í bróstinum ella blettin á lunganum, ella eftir at okkara familja er vorðin syndrað.

Lívsins ósemjur og kollveltingar hava teirra máta at minna okkum á, at henda verð er ikki okkara heimland. Vit tosa ikki málið hjá hesari verð flótandi. Mentanin her ørkymlar hjørtu okkara. Strongdin her gevur okkum svøvnleysar nætur. Henda verð lovar so nógv, men hevur stórar trupulleikar at halda lyftini. Men tað hevur minni at siga – vit hava eina ævinleikaadressu, sum er skrivað inn í hjørtu okkara: „Gud kallaði tykkum til sína ævigu dýrd.“ 1. Pæt. 5,10.

Sjálvt um vit hava fest eygu okkara upp á himmalin, hevur ferðin hjá summum okkara verið long, ógvuliga long og baldrut. Vit hava mist lívslangar dreymar. Vit hava fingið likam, sum ikki kann styðja anda okkara, ella hjúnafelaga, ið ikki vil lata trúgv okkara um seg ganga, ella rokningar, ið fara upp um tað, ið stendur á bankabókini, ella avbjóðingar, sum sláa beinini undan okkum – og vit møðast.

Tað kann vera torført at síggja málið í ódnini, og hugsanin bara at rýma frá øllum freistar okkum. Vit vilja so inniliga halda á, men av og á tykist leiðin bara so long. Minst tá til

hetta: Gud hevur ongantíð lovað okkum, at ferðin skuldi verða løtt; men hann hevur lovað, at tá ið vit koma á mál, fer tað at verða undurfult. Latið okkum líta á hann. Hann megnar at fáa okkum heim. Skjótt fara fótafetini av ferðini gjøgnum heimin at verða viskað burtur og gloymd í veitslugleðini.

*„... et Ord til Dagen“* – *Effie Campbell* umsetti.

# Guds kall gjøgnum eina gólvspann

Frk. Kvellestad er teologur og var lærari á bíbliuskúlanum í Staffelsgata í Oslo. Einaferð, tá ið hon var í Føroyum, greiddi hon á einari legu uppi í K.F.U.K. frá hesi hending, sum Jona hevur sagt mær:

„Tað var tann tíð, at bíbliuskúlin hevði so nógvar næmingar, at allir ikki fingu gist á skúlanum, men máttu út í býin at fáa sær kømur.

Ein genta, sum var næmingur á skúlanum og hevði kamar úti í býnum, kom ein dagin til leiðsluna á skúlanum og segði, at tað var fyri sær, sum hevði hon fingið kall at fara inn í fangahúsini at arbeiða. Lærararnir hildu, at tað kundi væl vera, og kanska var tað best, at hon slapp inn í eitt fangahús, so hon sá, hvussu har var vorðið.

Teir ringdu so til eitt kvinnufongsul; men fyristøðukvinnan var burturstødd, og hon hevði sagt, at eingin fremmandur skuldi sleppa inn í fongslið, meðan hon var burturi, bara tey avvarðandi.

So ringdu tey til eitt fangahús, har bert menn vóru; men eisini har sýttu tey henni atgongd.

So ringdu tey til eitt triðja fangahús har í býnum; men heldur ikki har slapp hon inn. Summir lærarar hildu, at nú var ikki meir at gera í hesi søk. Onkur einstakur teirra ivaðist í, um hon yvirhøvur hevði nakað kall. Kanska hevði hon bara lisið onkra frásøgn um onkra kvinnu, sum gjørdi eitt stórt arbeiði at vitja fangarnar, t.d. Mathilda Wrede ella Elisabeth Fry, og so hevði hon av hesum frásøgnum fingið hug at gjørt hitt sama, men talan um nakað veruligt kall mundi tað neyvan vera. Gentan sjálv ivaðist eisini.

Ein dagin, tá ið hon kom til hús, sá hon eina konu standa og vaska trappurnar í uppgongdini. Konan fall henni í eyguni.

Hon sá so ússalig og sjúk út. „Latið meg vaska trappurnar fyri tygum, so skulu tygum leggja tygum á song mína og hvíla tygum ímeðan,“ segði gentan.

„Nei, tað man ikki fara at bera til,“ helt konan. – „Jú, jú,“ segði gentan. Og soleiðis bleiv tað. Ein ávísan dag í vikuni vaskaði gentan trappurnar í uppgongdini, meðan konan hvíldi seg.

Ein dagin segði konan: „Tú trýrt ikki, hvussu ringt eg havi tað.“ Gentan noyddi hana tá at siga sær, hvat ið bagdi.

Konan greiddi tá frá, at maður hennara hevði havt eitt gott arbeiði; men hann hevði tikið av kassanum og falsað. Hann var tí settur í fongsul, sum lá eitt sindur uttan fyri býin. Tað var eisini púra beint, helt konan. Men grannarnir vendu henni bakið, tí nú var hon kona til ein lógbrotsmann, ein tukthúsfanga. Og børnini, ja, tey høvdu tað ikki mætari. Men hóast hesa ringu støðu tókti konuni synd í manninum. Hon vitjaði hann tann eina tíman um vikuna, sum var avsettur til hetta; men tað var so svárt fyri hana at ganga tey tungu sporini inn í eitt fangahús.

Tá ið gentan hoyrdi hetta, bleiv hon púra stív. Konan misskilti hetta í fyrstuni. Hon helt, at nú vísti gentan henni bakið, tá ið hon hoyrdi um tukthúsfangan. Men so segði gentan: „Eg kann gott koma við tygum, um tygum vilja.“ – „Nei, tað er alt ov mikið. Tú hevur hjálpt mær nokk við bara at lurta eftir mær,“ svaraði konan. – „Jú, álvara,“ segði gentan, „eg skal koma.“

Tær fóru so, og maðurin bleiv so ómetaliga glaður. Tá ið ein tíð var fráliðin, bleiv hann umvendur. – Tá ið fongsulsleiðslan sá, hvussu góða ávirkan henda unga gentan hevði á fangan, bleiv hon spurd, um hon hevði hug at vitja aðrar fangar. Tað vóru jú nógvir, sum ongantíð fingu vitjan. Tað vildi hon fegin. Hon gjørdi eitt ómetaliga stórt arbeiði har og bleiv til stóra signing.

Seinni kom tað til hana, at hon hevði møtt Guds kalli gjøgnum eina gólvspann. Hon hevði átikið sær hesa lítisverdu tænastuna at vaska trappur fyri eina neyðars konu, og um hon ikki hevði verið trúgv í hesum lítla, hevði Gud ikki kunnað brúkt hana til tað, sum størri var.

Henda frásøgnin lærir okkum eisini, at vit ikki mugu ivast um kallið hjá øðrum.

*Effie Campbell.*

# Spaklyntur

Í sæluprísanum stendur hjá Matt. 5,5: „Sæl eru tey spaklyntu, tí at tey skulu fáa jørðina í arv.“ – „Tað er ógjørligt hjá mær at vera spaklyntur, tí í okkara slekt eru vit snarsint og hava stutt fjús,“ sigur tú kanska. Ja, umberingarnar eru mangar. Men Jesus segði: „Lærið av mær; tí at eg eri spaklyntur og eyðmjúkur av hjarta.“ Matt. 11,29. Hann vil føra teg inn í spaklyndi og eyðmýkt. Vit eru frelst av náði, so har hava vit einki at erpa okkum av. Tað skuldi gjørt okkum eyðmjúk. At vera frelstur er at hava Jesus til Frelsara. Vit læra spaklyndi við at lesa í Bíbliuni og fylla okkum við Guds orði. Vit skulu vera sum leirið og lata hansara hond mynda okkum. Ætlanin er, at vit skulu bera frukt, og hann sker okkum, fyri at vit skulu bera upp aftur meir frukt.

Tá ið vit lesa í Bíbliuni, síggja vit, at Móses var sera tolin, ja, tolnari enn allir menn á jørð. (4. Mós. 12,3). Tá ið systkin hansara vórðu øvundsjúk inn á hann, fór hann ikki inn í nakað kjak við tey, nei, hann fór fram fyri Harran í forbøn fyri tey. Somuleiðis, tá ið njósnararnir komu aftur úr Kánáanlandi og púra høvdu mist dirvið og ætlaðu at steina Móses. Tá fór Móses fram fyri Harran og bað fyri hesum treiska fólki, av tí at Harrin gjørdist vreiður og ætlaði at beina fyri teimum.

Tú skalt siga sannleikan, so er tað ikki vist, at tú skalt siga meir, tí sannleikan kjakast vit ikki um. Tá ið Jesus stóð framman fyri Pilatusi, spurdi landshøvdingin hann: „Ert tú kongur jødanna?“ Jesus svaraði: „Tú sigur tað sjálvur.“ Jesus, sum er sjálvur sannleikin, hevði nú sagt Pilatusi sannleikan, og eftir hetta svaraði hann ikki Pilatusi aftur við einum tí einasta orði, tí sannleikan kjakast vit ikki um. Tað brýtur nógv meira niður, enn tað byggir upp. Vit eru skapt við tveimum oyrum og bara einum munni, og tí skulu vit lurta dupult so nógv, sum vit tosa.

*Effie Campbell.*



**SUNNUDAGSBLAÐIÐ**

***ynskir øllum eina gleðiliga hvítusunnu***



**SUNNUDAGSSKÚLIN**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 12. mai | **Tekstur:** | Matt. 28,16–20 | **Bíbliuorð:** | Matt. 28,20b |
| 19. mai | **Tekstur:** | **Hvítusunnudagur,** Áps. 2,1–18 | **Bíbliuorð:** | Áps. 1,8 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74